# Umsitingarfulltrúi

## Á Psykiatriska deplinum er eitt nýtt starv sum umsitingarfulltrúi leyst at søkja til setan 1. apríl 2011 ella skjótast til ber

**Psykiatriski depilin** stendur fyri allari sjúkrahús- og økispsykiatri í landinum og er ein av klinisku deplunum á Landssjúkrahúsinum. Á deplinum eru 110 ársverk og hevur depilin eina fíggjarjáttan á leið 60 milliónir krónur árliga, har meginparturin er markaður til lønir.

Psykiatriski depilin er í einari mennandi broytingartíð, har arbeitt verður við visjónini "Samskipaða røkt og viðgerð". Hetta merkir, at Psykiatriski depilin hevur ment eina toymisskipan, ið tekur støði í uppgávum, sum depilin hevur og í tí tilfeingi og teimum førleikum, sum eru á staðnum.

Umsitingarfulltrúin hevur sum høvuðsuppgávu at styrkja umsitingina á deplinum á øllum økjum. Serliga snýr tað seg um, saman við depilsleiðslu og øðrum leiðarum, at fyristanda neyva fíggjarliga stýring av tí tilfeingi, sum deplinum verður tillutað.

Harumframt verður tað uppgávan hjá umsitingarfulltrúanum at fyriskipa umsitingina á deplinum í mun til tey krøv, sum verða sett í lógum um heilsuverkið, fyrisitingarlóg, psykiatrilóg og øðrum lógarverki.

Umsitingarfulltrúin kemur at hava fyrisitingarligu starvsfólkaábyrgdina av teimum starvsfólkum, sum starvast í sentralu eindini á deplinum og sum umfata ymiskar fakbólkar, sum hava sínar fakligu leiðarar.

**Vit ynskja at tú hevur:**
- viðkomandi útbúgving frá hægri lærustovni
- hollan kunnleika til fíggjarstýring og fyrisiting
- hug og evni at arbeiða við nógvum ymiskum og skiftandi uppgávum
- hegni at samstarva við nógvar ymiskar fakbólkar
- hug til starvsfólkaleiðslu
- vilja til at vera við at arbeiða við visjón okkara um at skapa samskipaða røkt og viðgerð til psykiatriskar sjúklingar í Føroyum

**Psykiatriski depilin kann bjóða:**
- ein depil í støðugari menning, bæði fakliga og fyriskipanarliga
- eitt arbeiðsumhvørvi, sum er sermerkt av yrkisføri, opinleika, álit og virðing
- eitt dynamiskt fjølbroytt og spennandi arbeiði við ábyrgdarfullum uppgávum
- fakliga kompetentar og virknar starvsfelagar

Nærmasti fyrisetti er Psykiatriska depilsleiðslan.

Lønar- og setanartreytir smb. sáttmála millum avvarðandi yrkisfelag og Fíggjarmálaráðið.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Tormóð Stórá, leiðandi yvirlækna, tlf. 304500, lokal 4100 ella til Bergit Weihe, leiðandi sjúkrarøktarfrøðing, tlf 304500, lokal 4102.

**Umsóknarfreistin er
18. mars 2011
kl. 12.00**




## Onnur leys størv:

**Avbjóðandi størv sum læknaskrivari á Psykatriska deplinum**
4. mars 2011

**Fysioterapeutur**
7. mars 2011 kl. 12.00

**Sjúkrarøktarfrøðingar til Medisinska ambulatorium G3**
7. mars 2011 kl.12.00

**Sjúkrarøktarfrøðingur til Neurologiskt ambulatorium G3**
7. mars 2011 kl. 12.00

**Læknaskrivari.Læknaskrivari**
15. mars 2011

**Læknaskrivari til Neurologiskt ambulatorium**
22. mars 2011 kl. 12.00

**Overlæger med speciale i neurologi**
31. mars 2011

**Introstarv í Pædiatri**
12. apríl 2011

# Læknaskrivaranæmingar

## Tvey læruupláss eru leys at søkja til setan 1. september 2011

Talan er um eina lærutíð uppá íalt 2 ár, har 15 vikur eru býttar út á 5 modulir á 3-4 vikur á handilsskúla í Danmark. Hin parturin er starvsvenjingartíð við hollari undirvísing og einari rokeringssætlan á Landssjúkrahúsinum.

Hevur tú hug at arbeiða við menniskjum og hevur tú hug til eitt fjølbroytt, spennandi og avbjóðandi arbeiði? So er læknaskrivaraútbúgvingin møguliga nakað fyri teg.

Sum læknaskrivari arbeiðir tú við nógvum ymiskum fólkum, sum dagliga hava teirra gongd á sjúkrahúsinum. Samstarvið og samskiftið er við læknar, allar fakbólkar í sjúkrahúsverkinum, sjúklingar og avvarðandi.

**Upptøkukrøv:**
- HG (2 ára) ella HH
- HF- ella studentsprógv + HG prógv (12 vikur) frá Handilsskúla

**Førleikakrøv:**
- Hollur førleiki í føroyskum og donskum
- Góður førleiki í teldutøkni og tekstviðgerð
- Góð samstarvsevni/samskiftisevni
- Góður røkiskapur
- Kunnleiki í latíni er ein fyrimunur

Royndartíðin er 3 mánaðir.

Løn- og setanartreytir sambært sáttmála millum Starvsmannafelagið og Fíggjarmálaráðið

Nærri fæst at vita um læruplássini við at venda sær til Sæunn Ólavsdóttir Hansen, leiðsluskrivara/ Útbúgvingarleiðara, tlf. 304500, lokal 6103.

**Umsóknarfreistin er
4. apríl 2011 kl. 12.00.**

LANDSSJÚKRAHÚSIÐ

*Skrivlig umsókn við avriti av prógvum og viðmælum e.l. skal sendast til:*

***Landssjúkrahúsið
Lønar- og starvsfólkadeildin
FO-100 Tórshavn***